# Børn keypa mjólk í skúlanum

Kollafjarðar skúli byrjar um stutta tíð at selja mjólk til næmingarnar.

Á tíðindafundi í Barnabata í farnu viku, fingu vit upplýsingar um, hvat hetta felagið hevði arbeitt við í seinastuni.

Serliga deildin av Barnabata í Sundalagnum hevði verið virkin. Tey høvdu sent spurnarbløð út til næmingar í 5.-8. skúlaflokki kring alt landið, sum snúi seg um mjólkavanarnar hjá børnum.

Úrslitið av mjólkakanningini vísti, at bert 7 av 347 næmingum, sum ikki fóru heim til døgurða, fingu sær mjólk afturvið matinum, tey høvdu við. Ein spurningur ljóðaði, hví børnini ikki høvdu mjólk afturvið matinum, og her svaraðu tey flestu, at teimum ikki dámdi mjólk, sum ikki kom beinleiðis úr kuldaskápi.

Av hesum úrslitinum hevur Barnabati í Sundalagnum nú fingið til vega eitt kuldaskáp á skúlanum í Kollafirði, sum Kommunan hevur játtað at gjalda, og saman við Mjólkavirki Búnaðarmanna, sum fer undir framleiðslu av serligum mjólkapakkum við 1/4 litur í, fáa næmingarnir í boði at keypa ein 1/4 litur av mjólk fyri kr. 1,- sum kommunan og Mjólkavirkið Búnaðarmanna styðja í felag.

Mjólkakanningin vísti annars, at av teimum 687 børnunum, sum høvdu svarað spurnarbløðunum, drekka 553 av teimum føroyska mjólk og 134 drekka danska mjólk.




**Felagið Barnabati skipaði fyri listaframsýning og øðrum tiltøkum farna vikuskiftið.**

**Til hetta hevði Barnabati latið prenta eina plakat eftir klipp, sum William Heinesen hevði gjørt. Ágóðin av søluni fer til vælgerðar arbeiði í Barnabata.**

# Føroyskt bókasavn í Danmark

Annað arbeiði, sum Barnabati í Sundalagnum hevur gjørt er at kanna, um sjúklingar, sum fara til Danmarkar at fáa skúkraviðgerð, kunnu lána føroyskar bøkur á sjúkrahúsinum.

Her kom fram, at tað nærum ongar føroyskar bókmentir vóru til taks hjá børnum.

Barnabati í Sundalagnum hevur nú fingið samband við Ríkishospitalið í Keypmannahavn, og eru tey har áhugaði fyri at stovna eitt føroyskt bókasavn.

Gjøgnum Dansk-Færøsk Kulturfond hevur Barnabati fingið í lag stuðul kr. 30.000,- til stovnan av bókasavni á Ríkishospitalinum og á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn, eins og Aarhus Kommunehospital eisini hevur áhuga fyri at fáa føroyskar bøkur á savn teirra.

Við stovnanina av tí føroyska bókasavninum er eisini ætlanin, at aðrir enn føroyskir sjúklingar skulu lána úr savninum, sum skal verða til taks fyri allar føroyingar í Danmark.

# Hjálp til menningarlond

Í samband við »ár teirra brekaðu« er sum kunnugt settar ymsar nevndir, sum hava átikið sær, at arbeiða á ymsum økjum, so hjálpin í hesum árinum kann gerast so fjøllbroytt sum gjørligt.

Stórsti parturin av tí arbeiði, sum er gjørt í nevndum, hevur snúð seg um at bøta um korini hjá brekaðum á okkara leiðum, men við nevndini, sum nú er stovnað, er ætlanin at gera okkurt til gagns fyri menningarlond.

Í nevndini sita: Marna Olsen fyri Barnabata, Harry S. Johansen fyri Reyða Kross og Eivind Vilhelm fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.

Arbeiðsbólkurin skrivar, at tað sjálvandi er avmarkað, hvat eitt so lítið land sum Føroyar kann megna at hjálpa, har so stór hjálp er fyri neyðini á nærum øllum økjum. Nevndin, sum hevur arbeitt við hesum máli er samd um, at tað munar best, um tey seta inn á eitt avmarkað øki, og vóna, at tað eydnast teimum at fáa munagóða hjálp við at fyribyrgja barnalamni, og hava avgjørt í fyrstu atløgu at hjálpin skal fara til afrikanska landið Malawi.

Um hetta tiltakið skal eydnast, velst um hvørja undirtøku tað fær, skrivar nevndin og upplýsir, at Fútin hevur givið loyvið til at senda girokort út til hvørt húsarhald í Føroyum.

### Bert kr. 15,-

Nevndin fyri stuðul til Malawi skrivar at enda, at tey vilja heita á allar føroyingar við bøn um peningaligan stuðul. Fyri bert 15 kr., kunnu vit bjarga einum barni undan tí herviligu sjúku, sum barnalamni (polio) er. — Sjálvandi eru vit takksom fyri eina og hvørja gávu — stóra og lítla, men ynski okkara er, at hvørt einasta girokort kemur aftur, um tað so bert eru fáar krónur á tí.

Nevndin fyri »ár teirra brekaðu« í menningarlondum skrivar at enda; Vit vita, at tú vil hjálpa í hesum føri og tí siga vit hjartaliga takk fyri gávu tína!

# Politisk avreiðing

Tað mundi koma dátt við hjá flestu sjálvstýrisfólkum, tá tað frættist, at landsstýrismaður okkara Tórbjørn Poulsen vegna samgonguna legði uppskot fram á ting at avreiða ein part av sjálvstýri okkara til eitt útlendskt felag, ið eitur Trans World Radio.

Í grein í Tingakrossi nr. 32 sigur Tórbjørn, at hetta er einki floksmál, men at samgongan var samd um at leggja málið fyri tingið. Til hetta er at siga, at fyrr var illa um Sjálvstýrisflokkurin hevði gjørt tað til eitt floksmál at frásiga okkum okkara vunnu politisku rættindir. Hetta kann, sum er, um flokkurin verður við til at samtykkja uppskotið, koma at vera nóg dýrt fyri hann.

Øll sjálvstýrisfólk, ið hugsa polittiskt, mugu taka undir við P.M. Rasmussen tá hann í Tingakrossi nr. 31 sigur: Skal Sjálvstýrisflokkurin ikki svíkja síni grundsjónarmið, má hann í hvussu so er siga eitt klárt og greitt kortanei.

Sigast kann eisini, at leiðarin í Tingakrossi nr. 32 er eitt merkiligt fyribrigdi. Vert kundi verið at vita, um tað, har stendur, er almenna meining Sjálvstýrisflokksins. Serliga haldi eg, at pástandurin um at føroyski skúlin og kirkjan eru donsk, ikki skal standa óátalað.

Tað, eftir mínum tykki, mest óhugnaliga í slíkum máli er, at átrúni verður tengdur so fast at tí. Tann, sum í hesum føri, er í móti at vit avhenda okkara polittisku rættindir til útlendska fyritøku, verður beinan vegin skuldsettur fyri at vera í móti kristniboðan.

Tann 12. okt. kallaði Havnar Sjálvstýrisfelag til fundar fyri at viðgera málið um TWR. Frágreiðing frá fundinum stendur í Tingakrossi nr. 34, men tíverri er hon ógvuliga eintáttað.

Væntandi var, at á fundinum fór at verða givin ein nágreinilig frágreiðing um TWR -felagsskapin, men so var ikki, hóast fleiri ferðir varð spurt um hetta.

Av einum av luttakarunum skiltist, at tað var ómetaliga dýrt at fáa sendingar við í TWR, so mín uppfatan av hesum var, at her er talan um ein felagsskap, ið førir ein reiðiliga harðan forrætningspolitikk. Ein annar av fundarluttakarunum minti á, at tað í ár eru 25 ár síðani Edvard Mitens umboðandi Sjálvstýrisflokkin fekk Útvarp Føroya sett á stovn. Hugstoytt hevði verið um Sjálvstýrisflokkurin — nú 25 ár eftir — hevði verið við til at tikið tað polittiska støðið undan hesum mentunarstovni okkara.

Vónandi hugsa umboð Sjálvstýrisflokksins á tingi seg væl um, áðrenn teir selja okkara polittisku rættindir, fyri so lítið og lætt, sum her er talan um.

**Mortan Winther Poulsen**

# Her býr annað aftanfyri

**Jóh. 15,16 — Táið heimurin hatar tykkum, skulu tit vita, at hann hevur hatað meg, áðrenn hann hataði tykkum.**

Nú ið tað kemur at standa til okkara kosnu menn at taka støðu um ein sendari skal setast upp her hjá Trans World Radio at boða frelsu við trúgv á Harran Jesus, er hin óndi av øllum alvi ígjøgnum sínar tænarar farin at arbeiða ímóti hesi ætlan, og leggur boðskapin undir at vera amerikanska propagandu.

Ápostlasøgan 26,14 sigur: **Tær verður tær hart at sparka ímóti oddinum.**

Í 14. september leygardagin 3. oktober verður sagt, henda roynd má steðgast, og í 14. sept. herfyri sóknast teir eftir líknandi monnum sum Dahl og Victor.

Nei, her býr annað aftanfyri, nevniliga hin óndi (sálarfíggindin), sum í hesi tíð vil blinda eyguni og gera hetta til tjóðskaparligan miss, og hetta við Dahl og Victor er bara fyri at vera loyalir ímillum føroyafólk (trúarsamfeløgini).

Trúgvandi menn og kvinnur biðið fyri hesi søk.

Gud letur seg ikki spotta, tað ið menniskja sáar skal tað eisini heysta. Latið okkum vera vakin og kenna okkara ábyrgd fyri medmenniskjum okkara og virka út frá okkara oyggjum, so langt møguleiki er. Náttin kemur, tá eingin kann arbeiða.

**Latið okkum rannsaka vegir okkara og granska teir og latið okkum venda okkum til Harran.** — Sorgarsongirnir 3,40.

**Takk fyri upptøkuna**

**K.**